Tuberklavandin ið ikki var

Síðst í juni mánaði varð staðfest, at kokkurin á kinesisku matstovuni Nan-Tong var vorðin sjúkur av tuberklum. Hann varð innlagdur, og matstovan mátti lata aftur. Nú er hann frískur og stendur í køkinum á matstovuni aftur, men leysasøgur og stórt hóvasták kring tuberklasjúkuna hótta við at styggja fólk burtur og taka grundarlagið undan Nan-Tong

Kokkurin á Nan-Tong, Xiaobin Zhang, stendur nú aftur í kinesiska køkinum. Men ótti fyri tuberklum fær nakrar av matstovugestunum at halda seg burtur, hóast kokkurin er vorðin púra frískur aftur *Mynd: Jens K. Vang*

Rúnar Reistrup

Týsdagin læt matstovan Nan-Tong í Havn upp aftur eftir at hava verið stongd í ein lítlan mánað, tí einasti kokkurin var sjúkur.

Kokkurin Xiaobin Zhang fekk staðfest tuberklar, og hóast hendan sjúka ikki er so ræðulig longur, so varð hann innlagdur, til smittuvandin var av. Nú er hann frískur og er aftur til arbeiðis.

Men bara orðið tuberklar vekir tey allar ringastu minnini hjá nógvum fólki, og nú stúra tey á Nan-Tong fyri, at fólk fara at halda seg burtur frá matstovuni av ótta fyri at verða smittað. Linda Guttesen rekur saman við manni sínum, kokkinum, kinesisku matsovuna Nan-Tong. Hon gevur Sjónvarpi Føroya ein part av ábyrgdini fyri, at summi fólk nú helst fara at halda seg frá at vitja matstovuna, vegna ræðslu fyri tuberklum.

Sjónvarpið tók málið upp

Stutt eftir at maður hennara hevði fingið staðfest tuberklar, ringdi ein sjónvarpskvinna til hana, og spurdi um slaturin, sum gekk um Nan-Tong. Hon bjóðaði sær síðan til at taka lívið av hesum slatri við at gera eitt innslag í Dag og Viku um hvat veruliga var hent við kokkinum á matstovuni, og hví hendan nú hevði latið aftur fyribils.

- Hon spurdi so, um tað var satt, at hann var sjúkur, og eg segði sum var, at hann hevði tuberklar og lá á sjúkrahúsinum, har hann fekk viðgerð.

Linda sigur, at hon greiddi sjónvarpskvinnuni frá, at hon ikki helt tað vera rætt at gera eitt innslag í Degi og Viku um, at maður hennara var sjúkur av tuberklum, og síðan heitti hon beinleiðis á sjónvarpskvinnuna um ikki at gera nakað burturúr tí.

- Svarið eg tá fekk var, at var ikki nakað, sum vit avgjørdu. Tað avgjørdu tey á Sjónvarpinum. Sjónvarpskvinnan spurdi, um eg og børnini vóru blivin kannað, og segði so bara farvæl, sigur Linda.

Misvísandi innslag

Innslagið sá hon í Degi og Viku seinni um kvøldið. Har varð staðfest, at matstovan var stongd, orsakað av tuberklum, og síðan varð Jón á Steig, yvirlækni í lungasjúkum spurdur um nøkur viðurskifti viðvíkjandi tuberklum, har hann millum annað staðfesti, at vandin at verða smittaður av einum tuberklasjúklingi var lítil og eingin.

Linda Guttesen sigur, at tað gingu ymsikar løgnar søgur um mann hennara og sjúku hansara, men spurd um tað ikki var upp á sítt pláss, at fáa leysasøgurnar at tagna við einum tíðindastubba um tuberklatilburðin, sigur hon:

- Eg haldi at tað var skeivt av Sjónvarpinum at koma út við tí upp á handan mátan. Hatta var eftir mínum tykki eitt innslag, sum bara ørkymlaði fólk og setti fram fleiri spurningar enn tað svaraði. Eg havi tosað við fleiri fólk, ið sóu innslagið, men ikki høvdu fatað, at tuberklar ikki eru nøkur ræðulig sjúka longur.

- Har var ikki meira í tí enn tað, at vit noyddust at steingja matstovuna, tí einasti kokkur okkara var sjúkur. Høvdu vit havt ein annan kokk, ið kundi yvirtikið arbeiðið hjá manni mínum, so hevði ikki verið neyðugt at latið matstovuna aftur. Í sjónvarpinum varð tað ført fram sum at matstovan var stongd vegna tuberklar, og tað var í sínum breiðasta týdningi sum so heldur ikki beinleiðis skeivt, men eg vil kalla tað eitt sindur misvísandi og óneyðuga ræðandi, sigur Linda.

Vildi steðga leysasøgunum

Katrin Petersen, tíðindafólk á Sjónvarpi Føroya, gjørdi innslagið um tuberklasjúkuna hjá kokkinum á Nan-Tong.

- Mínar royndir siga mær, at tá man byrjar at hoyra fleiri ymiskar leysasøgur um eitt mál, so er tað besta ein kann gera, at koma út og greiða rætt frá málinum. Vit greiddu við innslagnum fólki frá, at tað var rætt, at kokkurin á Nan-Tong hevði tuberklar. Síðan lótu vit læknan, ið er serkønur í tuberklum, um at greiða fólki frá, at eingin smittuvandi var á ferð hjá teimum, ið høvdu etið á matstovuni, sigur Katrin Petersen.

Spurd um tað var rætt at gera innslagið, hóast Linda Guttesen sum avvarðandi heitti á hana um at lata vera, sigur Katrin Petersen, at Sjónvarpið sum tíðindamiðil ikki kann taka hædd fyri, at eitt innslag kann skaða umdømið hjá einari fyritøku.

- Eg meini at tað var frægari fyri matstovuna, at vit komu út og greiddu frá umstøðunum, enn um leysasøgurnar sluppu at ganga sína gongd, tí vit vita, hvussu skjótt ein fjøður kann gerast til fimm hønur, sigur Katrin Petersen, tíðindafólk á Sjónvarpi Føroya.

Fólk ræðast sjúkuna

Linda Guttesen sigur seg rokna við, at talið á gestum á matstovuni fer at minka orsakað av nógva hóvastáknum kring tuberklarnar hjá kokkinum.

- Eg vænti tíverri at nógv fólk fara at seta seg aftur og ikki koma oman á matstovuna, eftir at tey hava hoyrt um tuberklarnar hjá kokkinum. Vit hava nógvar tilkomnar matstovugestir, og man kann rokna við, at júst tey eru eitt sindur bangin, tí tey kenna til ræðuleikarnar, ið fyrr stóðust av tuberklum, sigur Linda.

Hon vónar tó ikki, at hetta fer at hava við sær, at fólk heilt venda matstovuni bakið, men at tey venda aftur, tá hóvastákið hevur lagt seg.

- Eg skilji væl at fólk eru bangin fyri tuberklasjúkuni, tí hon var jú heilt ræðulig fyrr. Ev tí sama er tað so umráðandi, at ein tuberklatilburður verður umrøddur við varðsemi, soleiðis at misskiljingar ikki koma fyri. Eg vóni bara at fólk duga at skilja, at tilburðurin hevði einki við sjálva matstovuna at gera, og at kokkurin nú er púra frískur av sjúkuni.

Varð innlagdur beinanvegin

Kokkurin á Nan-Tong, Xiaobin Zhang, fekk staðfest tuberklar síðst í juni mánaði, og varð beinanvegin innlagdur til viðgerðar. Av tí at hann var einasti kokkur á matsovuni, var ikki annað at gera enn at steingja matstovuna, til sjúkan gekk yvir.

Tuberklar smitta ígjøgnum spýtt, og skal sjúkan smitta, krevur tað bæði at tann smittaði kemur rættiliga nær einum øðrum persóni, og at hesin er illa fyri heilsuliga og tískil ikki kann standa ímóti smittuni.

- Kokkurin hevur verið innlagdur, tí at hann hevur kunnað smittað. Á sjúkrahúsinum hevur hann fingið heilivág, og sambært læknunum er eingin smittuvandi eftir at tann sjúki hevur fingið heilivág í 14 dagar, sigur Linda Guttesen

Fyri einari viku síðan, tá fullkomulig vissa var fyri, at hann ikki kunni smitta longur, varð Xiaobin Zhang útskrivaður, og týsdagin stóð hann aftur í kinesiska køkinum á Nan-Tong.

Cafe Natúr kann vænta sær tiltøk

Komandi dagarnar verða tiltøk sett í verk ímóti Cafe Natúr, sigur Havnar Arbeiðskvinnufelag, sum nú er komið aktivt inn í málið

Rúnar Reistrup

Rokið á Cafe Natúr, har ellivu starvsfólk vórðu biðin um at fara til hús, eftir at tey saman høvdu sett fram krav um betri løn, fer ikki ósvarað framvið.

Havnar Arbeiðskvinnufelag, sum saman við Føroya Arbeiðarafelag hevur fyrireikað eina herferð fyri at fáa gistingarhús og matstovur at fylgja sáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag, er nú komið upp í málið.

Eitt umboð fyri fyrrverandi starvsfólkini á Cafe Natúr var mikumorgunin á fundi við Arbeiðskvinnufelagið, og í gjár var ætlanin, at øll tey ellivu fólkini, sum fram til týsmorgunin starvaðust á Cafe Natúr, skuldu á fund við Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Hótt tríggjar ferðir

– Hatta var triðju ferð at leiðslan á Cafe Natúr hevur hótt starvsfólk, ið hava viljað skipað seg, so nú noyðast vit at svara aftur, sigur forkvinnan í Havnar Arbeiðskvinnufelag, Vígdis Johannesen.

Sóley Hansen, sum vegna tey ellivu fyrrverandi starvsfólkini var á fundi við fakfelagið gjáramorgunin, lovar eisini, at nú verður ikki steðgað, fyrr enn starvsfólka- og lønarviðurskiftini eru komin í rættlag á Cafe Natúr.

Hvørji tiltøk talan verður um, er ikki greitt enn, men tey verða vend beinleiðis ímóti virkseminum á Cafe Natúr, verður sagt.

Ikki limir í felagnum

Eingin av teimum ellivu starvsfólkunum á Cafe Natúr var limur í nøkrum fakfelagi, tá starvsfólkafundurin á cafeini týsmorgunin endaði við, at tey ellivu vórðu biðin um at fara.

Men Havnar Arbeiðskvinnufelag hevur kortini valt at umboða tey, sum vóru tey partur av felagnum.

– Vit vita hvørjar umstøður tey hava havt at arbeitt undir, og at tey ikki ótarnað høvdu møguleika at melda seg inn í felagið. Tískil er tað í lagi, at tey ikki koma fyrr enn nú, sigur Vígdis Johannesen

Herferð ímóti bransjuni

Føroya Arbeiðsmannafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag sendu týsdagin út tíðindaskriv, har nøvnini á nníggju matstovum og gistingarhúsum, ið ikki fylgja sáttmálanum, vórðu kunngjørd.

Hesi vóru: Hotel Hafnia, Rio Bravo, Nan-Tong, Hotel Føroyar, Cafe Natúr, Pizza 67, Sjómansheimið í Tórshavn, Marco Polo og Sjómansheimið í Runavík. Hetta er fyrsti liður í eini herferð hjá hesum báðum fakfeløgum at fáa skipaði arbeiðs- og lønarviðurskifti í lag í matstovu- og gistingarhúsídnaðinum.

– Hatta er tann einasta stóra bransjan í Føroyum, ið als ikki hevur skipaði starvsfólkaviðurskifti. Tey siga, at tey hava ikki ráð, men tað kann ikki vera rætt. matstovu- og gistingarhúsbransjan hevur nevniliga tann bíligasta sáttmálan, sum Føroya Arbeiðarafelag hevur undirskrivað, sigur Vígdis Johannesen, forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Í gjár skuldi felagið hava fund við sjeymanna fakfelagsbólkin, har umboð í sjey teimum størstu fakfeløgunum í landinum hava sess. Væntandi var, at hesi fóru at lýsa sín stuðul til Havnar Arbeiðskvinnufelag og Føroya Arbeiðarafelag í málinum um starvsfólkaóskili- innan matstovu- og gistingarhúsvinnuna í Føroyum.

Stýrisskipanin í stríð við seg sjálva

Samstundis, sum stýrisskipanarlógin geur løgmanni treytaleyst vald at skipa landsstýri og seta landsstýrismenn, tekur hon í aðrari grein sama vald frá aftur løgmanni

Løgmaður vil ikki, at málið um landsstýrissessin hjá Tórbirni Jacobsen skal kunna nýtast at fella hann. Tí skal løgfrøðiliga grundarlagið kannast út í æsir

John Johannessen

Stýrisskipanarlógin er so míkið í stríð við seg sjálva, at hon í ávísum førum tekur treytaleysa valdið frá løgmanni.

Hetta eru løgmaður og løgfrøðisligu ráðgevar hansara samdir um. Teir vísa á, at partur av stýriskipanini gevur løgmanni treytaleyst vald yvir landsstýrinum, meðan annar partur tekur hetta vald frá aftur løgmanni.

Trupulleikin er komin fram, nú løgmaður skuldi tilnevna Tórbjørn Jacobsen sum nýggjan landsstýrismann, men tó ikki fekk sett hann, tí fíggarlig játtan fekst ikki frá fíggjarnevnd løgtingsins.

Stýrisskipanin gevur nevniliga løgmanni í einum føri treytaleyst vald til at skipa landsstýrið, sum hann vil. Men í øðrum føri sigur hon, at eingin útreiðsla – heldur ikki løn til landsstýrismann – má verða goldin uttan løgtingsheimild.

Stríð millum greinarnar

Tað eru grein 27 og grein 43 í stýrisskipanarlógini, sum stríða ímóti hvørjari aðrari.

Grein 27, stykki 2, gevur løgmanni treytaleyst vald yvir landsstýrinum, meðan grein 43, stykki 2, tekur hetta vald frá aftur løgmanni.

Í grein 27, stykki 2, í stýrisskipanarlógini stendur, at tað er løgmaður, sum ásetur, hvussu nógvir landsstýrismenn skulu vera í landsstýrinum. Og eisini er tað løgmaður, sum tilnevnir landsstýrismenninar.

Men hin greinin, nevniliga grein 43, stykki 2, sigur, at eingin útreiðsla má verða goldin, uttan so, at heimild er fyri henni í galdandi fíggjarlóg, ella aðrari játtanarlóg, tá ávíst verður.

Tískil kann løgmaður, sambært grein 43, stykki 2, ikki seta nýggjan landsstýrismann, um ikki játtan frammanundan fyriliggur frá løgtinginum.

Lógin ikki eftirfarandi

Løgmaður og ráðgevar hansara eru í hesum føri samdir um, at útgreiningin av játtanarskipanini í stýrisskipanarlógini ikki er eftirfarandi.

– Stýrisskipanin sigur heilt greitt, at løgmaður hevur treytaleyst vald at skipa landsstýrið, sum honum lystir. Tí kann tað ikki vera rætt, at tað kortini er løgtingið, sum í seinasta enda tekur avgerðina, sigur løgmaður.

Anfinn Kallsberg vísir á, at løgmaður eisini hevur fullan rætt at senda tingið heim og skriva út nýval. Men sambært játtanarlógini, er hann fyrst noyddur at biðja tingið um eykajáttan til nývalið.

– Hetta, síggja vit, hongur ikki saman. Tað kann ikki vera rætt, at løgmaður skal biðja tingið um eykajáttan, ætlar hann at skriva út nýval. Játtanarlógin er als ikki eftirfarandi á hesum øki, vísir Anfinn Kallsberg á.

Brýtur tríbýtta valdið

Løgmaður vísir á, at valdi í Føroyum er tríbýtt. Vit hava eitt dómsvald, eitt lóggevandi vald og eitt útinnandi vald.

Tað kann henda, at tað dømandi valdið dømir útinnandi valdið til at rinda ein bót ella eitt endurgjald. Tá hevur landsstýrið sjálvsagt skyldu til at rinda endurgjaldið.

Men sambært løgmanni kann landsstýrið sambært grein 43, stykki 3, ikki rinda bótina ella endugjaldið, fyrr enn løgtingið ella fíggjarnevnd løgtingsins hevur játtað landsstýrinum neyðuga peningin.

Løgmaður vísir á, at um peningur til slíkt endugjald ikki verður játtaður, brýtur landsstýrið treytaleysa valdið hjá dómstólinum.

Í donskum stjórnarrættarligum bókmentum er semja um, at ein ráðharri kann rinda eina upphædd, sum staturin er dømdur at gjalda, uttan frammanundan at tryggja sær játtan til endamálið, og er hetta grundgivið við valdsbýtinum í grein 3 í donsku grundlógini.

Vil hava greiðar linjur

Løgfrøðingarnir í Tinganesi halda heilt greitt, at tann parturin í stýrisskipanarlógini, ið gevur løgmanni treytaleyst vald, er tann parturin, ið vigar tyngst.

Men kortini vil løgmaður ikki tilnevna Tórbjørn Jacobsen sum nýggjan landsstýrismann, fyrr enn hann hevur fingið somu tilsøgn frá formansskapi løgtingsins, løgtingsgrannskoðaranum og landsstýrismálanevndini.

– Eg vil ikki, at hetta mál á nakran hátt skal kunna nýtast til at fella meg. Tí vil eg hava púra greiðar linjur, áðrenn eg geri nakað sum helst, sigur løgmaður.

Lesarabræv

Helena Dam á Neystabø

Tað man harma mangan pensionist her á landi – eisini pensionistar, ið ikki blanda seg upp í partapolitikk, at Helena nú fær ta viðferð, sum hon frá nøkrum tingmonnum fær.

Øll vita, at Helena hevur eitt sera krevjandi arbeiði at røkja, og sur var limur í nøkrum fakfelagi, tá starvsfólkafundurin á cafeini týsmorgunin endaði við, at tey ellivu vórðu biðin um at fara.

Men Havnar Arbeiðskvinnufelag hevur kortini valt at umboða tey, sum vóru tey partur av felagnum.

– Vit vita hvørjar umstøður tey hava havt at arbeitt undir, og at tey ikki ótarnað høvdu møguleika at melda seg inn í felagið. Tískil er taðan ikki eitt stórt og fruktagott arbeiði innan fyri heilsuverkið.

Vit vita øll, at eitt tað fyrsta, ið hon setti sær fyri, var at fáa gjørt nakað munagott fyri pensionistar, sum máttu liva á hungursmarkinum.

Sum formaður fyri eldraráðið havi eg gjølla fylgt við og kannað støðu pensionistanna og livikor teirra. Her verður meint við pensjonistar, sum ikki hava atgongd til lønandi vinnu, og sum heldur ikki fáa tvær pensiónir, men einans hava fólkapensiónina at líta á. Har stóð ikki væl til hjá mongum.

Tað kann prógvast, at eingin landsstýrismaður hevur áður lagt soleiðis til brots fyri her at kunna fremja nakað til bata. Tí dugi eg ikki at fata, at fyrrverandi landsstýrismaður, sum ikki fekk í lag at hækka pensiónina, eins og Helena nú hevur fingið samgonguna at ganga við til.

Eg meti hetta vera eina eirindaleysa forfylging av henni fyri møgulig mistøk, sum jú hennara lógkønu embætisfólk áttu at kunna stýrt henni uttanum. Tað kann prógvast, at viðurskiftini hjá pensionistum eru nógv betri nú, so at tað er einki høpi í, at dugnaligir og vælviljandi politikarar soleiðis skulu verða kroystir upp í ein krók vegna tess, at embætismannaverkið tykist at hava ilt við at finna útav, hvatið er rangt, og hvatið er rætt í einari fløktari, nýggjari stýrisskipan.

So eg fari at heita á okkara løgmann um at hugsa seg væl um í hesum málinum, og tað álit havi eg á honum at hann ger.

Nakað líknandi mál er viðvíkjandi Signari á Brúnni. Øll, sum kenna Signar vita, at hann vil iki fremja nøkur mál við lógloysi. Signar er eitt fyridømi sum landspolitikari, sakligur og viljagóður og vil fólkinum tað allarbesta.

Símun P. Poulsen

aprilia Royndarkoyring
frá mánadegnum 17/7 til leygardagin 22/7
Støkk inn á gólvið og fá ein royndartúr á einum av okkara motorsúkklum
Pegaso 650
• Skivubremsur framman og aftan
• 1 cylindara vatnkøldur motorur
• 5 gear

SL 1000
• Skivubremsur framman og aftan
• 2 cylindara motorur við AVDC
• 6 gear
• 118 HK
Ein kraftfull maskina, ið liggur væl á øllum vegum. Gevur reina koyrigleði.
Sosialurin - 311820
SR 125
• Skivubremsur framman
• 1 cylindara luftkøldur motorur
• Automatisk variator gearkassi

Í vikuni verða 4 brúktir skootarar seldir til hægstbjóðandi.
Eisini nógv onnur góð tilboð.
AD-IMPORT
N. Finsensgøta 12 • 100 Tórshavn • Tel. 213000